# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt stig móti málinum

Løgtingið hevur endaliga avgreitt málið um depil í Marknagili til teir tríggjar stóru skúlarnar, Studentaskúlan, Handilsskúlan og Tekniska skúla. Við lógini verður heimilað landsstýrismanninum at byggja skúladepil í Tórshavn innan ásettan játtanarkarm á fíggjarlógini. Við lógini verður upprunalógin hjá undanfarnu samgongu sett úr gildi, og merkir hetta, at nýggja verkætlanin verður fíggjað beinleiðis yvir fíggjarlógina uttan lántøku. Hetta er í sjálvum sær áhugavert, tí hetta er enn ein staðfesting av, at tann beinharði, mestsum fundamentalistiski fíggjarpolitikkurin hjá fullveldissamgonguni aftur er komin í hásætið. Hinvegin er ikki lætt at finna grundir, ið tala í móti hesum fíggingarformi í eini støðu, har landskassin hevur ríkiligt av peningi, so tað er ivaleyst skilagott ikki at fíggja verkætlan við lántøku.

Tað er alkunnugt, at Tekniski Skúli og Føroya Studentaskúli og HF-skeið í mong ár hava havt fullkomuliga ótíðarhóskandi karmar. Handilsskúlin hevur eisini plásstrot, og avgerðin um at byggja er tí eitt stórt stig móti málinum at skapa hóskandi karmar um hesar sera týdningarmiklu skúlar.

Sum kunnungt var deplin eitt stórt mál hjá undanfarnu samgongu, og alt bendir á, at ósemja hevur verið, tí depilsuppskotið hjá tí samgonguni fevndi ikki um Føroya Studentaskúla. Hetta var ein stórur veikleiki við verkætlanini, og tí er tað nú bert at fegnast um, at tað hevur eydnast hesari samgonguni at skapa semju um, at verkætlanin skal fevna um allar tríggjar skúlar. Hóast verkætlanin enn ikki tykist heilt liðug m. a. tí hølistørvurin enn ikki er lýstur út í æsur, so liggur fast, at byggjast skulu 17.000 fermetrar, og at verandi handilsskúli verður innlimaður í nýggju verkætlanina, um tørvur er á hesum.

Bygningurin skal verða liðugur í 2013, og er her talan um størstu skúlabygging nakrantíð. Nú eru so gongd komin á hetta mál, ið hevur spøkt síðan áttatiárini. Næsta takið er at nútímansgera og samskipa hesar tríggjar stovnar, sum skulu húsast í nýggju borgini í Marknagili. Næsta stigið snýr seg sostatt um tað, ið vanliga tykist hava minsta áhugan hjá føroyskum politikarum, nevniliga innihald og stovnsbygnaður. Frá undanmanni sínum hevur landsstýriskvinnan arvað eitt gott støði fyri hesum parti av verkætlanini. Undanfarna samgonga kunngjørdi eina ætlan um at samskipa alla miðnámsútbúgvin í Føroyum, og nú er lagamanni at seta fulla ferð á hesa tilgongd. Í hesi tilgongd eigur at verða leitað við ljós og lykt eftir øllum hugsandi rationaliseringsmøguleikum og møguleikum fyri heilt ella lutvísari samanlegging av útbúgvingum. Tað kann ikki vera skilagott og rationelt at hava fleiri miðnámsútbúgvingar enn grannalond í einum so lítlum landi sum okkara. Her mugu vera stórir møguleikar fyri eini skilabetri og ódýrari skipan.

**Sosialurin**

## Tí stilli eg upp

ANNSY HØGHAMAR



**Við mínum drúgvu royndum frá ítróttararbeiði haldi eg meg hava nakað at geva, og tí havi eg tikið av avbjóðingini at lata meg stilla upp til forsetavalið í ÍSF**

**Hvør eri eg**
Eg eiti Annsy Høghamar, eri fødd og uppvaksin á Eiði, men havi í mong ár búð í Havn. Á Eiði var familjan virkin í bæði hond- og fótbólti, og tað gjørdist eg eisini. Tá eg í 70-unum flutti til Havnar, fylgdi ítróttaráhugin við, og eg havi verið virkin í hondbólti í Kyndli, sum bæði spælari, venjari og nevndarlimur. Til fyri tveimum árum síðani havi eg verið virkin í nevndini í felagnum.

**Hví stilli eg upp**
Tá eg fekk áheitan frá Hondbóltssambandi Føroya og stuðul frá øðrum sersambondum, gjørdi eg av, at eg vildi taka við avbjóðingini. Sum virkin á mongum økjum innan ítrótt, síggi eg hetta sum eina stóra og spennandi avbjóðing, og við mínum drúgvu royndum haldi eg meg hava nógv at geva.

**Hvat vil eg**
Støðan hjá feløgunum stendur mínum hjarta nær, og eg vil virka fyri at hjálpa feløgunum, so tey kunnu mennast og styrkjast á fleiri økjum. Ikki minst vil eg vera við til at styrkja nevndararbeiði, skunda undir spælara- og venjaraútbúgvingar og virka fyri førleikamenning í feløgum sum heild.

- Føroyskur ítróttur skal altíð vera eitt gott tilboð til øll, tí ítrótturin er sjálvboðin og mennandi fyri bæði børn, ung, tilkomin og gomul

- Neyðugt er støðugt at menna bæði elitu og breidd, og her hugsi eg í høvuðsheitum um elituna í samstarvi við sersambondini og breiddina í samstarvi við feløgini

- Umráðandi er, at ítróttarfeløg og ítróttarfólk virka við ábyrgd, so tað altíð gevast bestu umstøður hjá børnum og ungum at bæði venja og kappast í einum rúsfríum og tryggum umhvørvi

- Sersambondini skulu stuðlast í menning av altjóða limaskapi og samstarvi, og eitt mál eigur at vera, at fleiri føroyingar gerast virknir í nevndar- og leiðsluarbeiði í altjóða høpi

- Saman við sersambondunum eigur dentur at verða lagdur á førleikamenning við skeiðum av ymsum slagi fyri bæði spælarar, venjarar, nevndarlimir og onnur, ið varða av ítróttinum

- Ítróttasamband Føroya eigur at vera eitt stað, har øll kunnu leita sær ráð og vegleiðing í bæði ítróttarligum og skipanarligum spurningum

- Størri ljós skal varpast á tann týdning, ítrótturin hevur fyri fólkaheilsuna, tí ítróttur og góð heilsa ganga hond í hond

- Eg vil virka fyri, at ítrótturin fær bestu karmar at virka undir, og her eigur samstarvið millum Ítróttasamband Føroya og myndugleikarnar at mennast og styrkjast á fleiri økjum, so mest fæst burturúr at útvega fleiri mennandi tilboð til børn, ung og vaksin

- Flestu ítróttargreinar hava altjóða viðurkenning, men enn ikki allar, og tí vil eg arbeiða fyri, at vit á øllum mótum styrkja og menna altjóða samstarv og stuðla allar royndir at fáa altjóða limaskap

Eg fegnist um, at sersambondini eiga og røkja sín altjóða leiklut á besta hátt, og eg frøist um, at eitt stórt arbeiði verður gjørt í sersambondunum. Elitan er í sersambondunum fyrst og fremst, og ofta hava vit einstaklingar, sum standa seg væl í altjóða høpi. Hesi eru allarbesta »ambassadørar« fyri Føroyar, og tí vil eg virka fyri, at tey fáa bestu umstøður til bæði venjing og kapping.

***við ítróttarkvøðu***

## Suðuroyarprestur fer lætt um...

JÓHANN MORTENSEN
Tíðindaleiðari í útvarpinum



Suðuroyarprestur, Jónsvein Bech, sigur ikki satt, tá hann í bløðunum týskvøldið skrivar um hátíðarhaldið, nú kirkjan á Tvøroyri fer um tey 100 árini:

"Ikki so frægt, at tað var vert at nevna í nakrari av tíðindasendingunum".

Skal upplýsa suðuroyarpresti, at vit høvdu tíðindi um kirkjuna og hátíðarhaldið mikudagin - dagin fyri hátíðarhaldið á Tvøroyri 1. mai. Somuleiðis høvdu vit tíðindastubba um skránna í vikuskiftinum.

Ikki fyrrenn dagin fyri hátíðarhaldið kom eitt lívstekin frá kirkjuni - kirkjuráði ella presti - tá ein faldari kom á tíðindadeildina.

Fáar dagar undan hátíðarhaldinum segði ein starvsfelagi mær, at hon hevði frætt, at 100 ára hátíðarhald skuldi haldast Kristi Himmalsferðardag, men at einki alment var upplýst um tað.

Ringdi til Tvøroyar týsdagin fyri at vita, um tað var so. Fekk upplýst, at tað passaði og at skráin lá á tíðindaportalinum hjá Suðurrás.

Hevði ikki ætlað at leggja meg í orðaskiftið um kirkjuliga hátíðarhaldið á Tvøroyri og vantandi luttøkuna hjá Kringvarpi Føroya, men tá prestur skrivar nakað, sum ikki er rætt, loyvi eg mær at koma við hesi rættleiðing.

Kann leggja aftrat, at tá onkur - áhugafelag, ítróttarfelag, fyritøka ella stovnur - hevur ein mekisdag, so boða tey vanliga frá hesum í góðari tíð. Bara fyri at kunna um tað. Ikki eitt kis frættist um hátíðarhaldið á Tvøroyri. Fyrireikararnir - prestur ella kirkjuráð - eiga eisini at stinga í egnan barm, og spyrja, um tey ikki eisini eiga ein part vantandi tíðindaflutningi ella luttøku.

Suðuroyarprestur sigur seg vera væl nøgdan við hátíðarhaldið og at fyrireikararnir hava fingið nógvar jaligar afturmeldingar um tað. Tað er gleðiligt, men jaligu afturmeldingarnar høvdu óivað verið fleiri, um fyrireikararnir høvdu lagt hátíðarhaldið, soleiðis at tað slapst aftur og fram hátíðardagin.

Við Smyrli slapst ikki til guðstænastuna kl. 11, tí tá var Smyril ikki komin suður, og heldur ikki var møguligt at náa almennu móttøkuna kl. 18, tí tá var Smyril á veg norðuraftur. V.ø.o. var neyðugt at fara suður mikudag og norðuraftur fríggjadag!!! Kundu fyrireikararnir ikki havt flutt guðstænastuna til á miðdegi og hátíðarhaldið til fyrr seinrapartin?

Loyvi mær at enda spyrja suðuroyarprest, hvat hann meinar, tá hann skrivar: "Og framyvir skulu vit nokk lata vera við at órógva tykkum fleiri sunnu- og halgidagar."?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.